




# Mynd av Kirkju í Kirkjubø

## Jólagudstænasta í Kirkjubøar kirkju

JÓL

*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

Sum siður er á hvørjum ári var jólagudstænasta í Kirkjubøar kirkju mánakvøldið fyri skúlanæmingunum í Velbastaðar skúla og avvarðandi teirra. Hetta er altíð ein ógvuliga hátíðarlig og hugnalig løta, har ikki bara ein væl upplagdur prestur, men eisini næmingarnir – bæði yngri og eldri – seta sín dám á løtuna. Henda elsta kirkjan í Føroyum, ytst við sjóvarmálan, er fullkomin karmur um eina slíka løtu, bølaniða uttanfyri, brennandi kertiljós innan og fullsett kirkja.

Heri Joensen, prestur, segði frá tveimum søgum, fyrra um barnið, sum varð føtt í fjósi, og seinna hví júst granntræið er jólatræ. Væl dugir hann at siga frá, tí hesa løtuna var púra kvirt í kirkjuni hóast nógv smábørn vóru hjástødd. Elstu næmingarnir lósu inngangs- og útgangsbøn og jólaevangeliið. Næmingarnir í miðdeildini, tað er í triðja til fimta flokk, høvdu framsýning við gipsfigurum og tekningum við íblástri úr jólaboðskapinum. Eisini høvdu teir úr leiri gjørt ein eftirgjørdan Kirkjubøarmúr við Kirkjubøarstólunum innan. Ógvuliga hugtakandi.

Næmingatalið í skúlanum á Velbastað er 49; næmingarnir koma úr Kirkjubø, Velbastað og Havn.

# Vindurin kravt eitt mannalív

Um 10-tíðina í morgun doyði ein maður, tá ið vørubilurin, sum hann koyrdi, varð tikin av vegnum Millum Fjarða

Tað hevur verið nógvur vindur kring landið í morgun. Um 10-tíðina var vindurin orsøk til, at ein vørubilur varð tikin av vegnum Millum Fjarða. Bilførarin, sum var einsamallur í bilinum, doyði av løstinum, sum hann fekk. Maðurin hevur fingið so ógvusligan stoyt, at hann doyði.

- Tveir bilar koyrdu aftanfyri vørubilin, men teir sluppu snikkaleysir. Teir boðaðu okkum frá. Tað sær út til, at maðurin, sum doyði, ikki varð slongdur úr stýrihúsinum, verður upplýst av løgreglustøðini í Runavík.

Annars hevur løgreglan ikki fingið nakra fráboðan um stórvegis skaða av vindinum.

Lesið Sosialin -so eru tit við!